| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 25. mars 2010 |
| Býráðsfundur nr. | 04/2010 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Marin Sólheim Thomsen |
| | |

Ár 2010 tann 25. mars kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 18. mars 2010 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Gordon M. Petersen
Elisabeth D.E. Olsen
Kristina Toftegaard Larsen
Bjørghild Arnholdtsdóttir
Magnus Midjord
Eyðun á Lakjuni
Petur Abrahamsen

Jann N. Toftegaard kundi ikki møta og hevði tí boðað Gordon M. Petersen til býráðsfundar.

**Skrivari:** Marin Sólheim Thomsen, fíggjarleiðari

## Mál nr. 06/2010.

**Mál viðv. broytan av byggisamtykt fyri Fuglafjarðar kommmunu umfatandi ásetingum fyri sethúsaøkir á Hellunum.**

**"ÁSETINGAR" FYRI "ØKI" "B":**

1. Í Fuglafirði og á Kambsdali skulu Grundstykkini verða í minsta lagi 500 m2 til støddar. Tá ið byggingin verður framd eftir byggiskipan, sum bygdaráðið hevur góðkent og tryggjað ella eftir serstakari byggisamtykt, kann bygdaráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 500 m2, tó í minsta lagi 400 m2 fyri stakhús (einhúskishús) og 300 m2 fyri hvønn partin av einum tvíhúsum, ketu- ella raðhúsum. Ein partur av teirri ásettu minstuvídd kann verða lagdur burturav sum felags tilhalds- og bilstøðlaøki.

   Á Hellunum kann býráði loyva at grundstykkir kunu verða niður í 250 m2.

2. Nettonýtingarstigið má ikki fara upp um 0.3 fyri einhúskis og 0.6 fyri tvíhús, ketu- ella raðhús.
   Á grundstykkjum minni enn 300 m2 má nettonýtingarstigið ikki fara upp um 0,5. Millum 300 og 500 m2 verður nettonýtingarstigið minka lutfallsliga frá 0,5 til 0,3.

Tekniska nevnd kommununar mælir á fundi 16. mars 2010 býráðnum til, at ásetingarnar fyri sethúsaøkið á Hellunum verða broyttar soleiðis, at grundstykkini kunnu verða niður í 250 m2, samb. fyriliggjandi uppskot.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevnd soleiðis at, ásetingarnar fyri sethúsaøkið á Hellunum verða broyttar til, at grundstykkini kunnu verða niður í 250 m2.(9-0)

## **Mál nr. 07/2010.**
## Mál viðv. tali á búfólkum á Vesturstovu.

Sosiala nevndin hevur á fundi, **tann 22. februar 2010** viðgjørt eitt uppskot frá arbeiðsbólkinum, innan eldrabygging.
Í arbeiðsbólkinum sita: Unna Næs, heimarøktin, Marianna Hansen, leiðari í Vesturstovu og Sunniva á Lakjuni, leiðari á Gjiljagarði.

Uppskoti er at minka bútalið á Vesturstovu, so líðandi. Byrjað skuldi verið í ovaru hæddini.

**Sosiala nevndin samtykti at leggja málið fyri á býráðsfundi, og heita á býráðið um at taka støðu til, um at minka bútalið á Vesturstovu við einum fólki, frá 2011.**

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá sosialu nevnd soleiðis, at bútalið á Vesturstovu kann minkast við einum fólki, frá 2011 at rokna. (9-0)

Bókin lisin og fundur lokin kl. 18,00.

Dánjal Vang

Gordon M. Petersen

Elisabeth D.E. Olsen

Kristina Toftegaard Larsen

Bjørghild Arnholdtsdóttir

Magnus Midjord

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Marin S. Thomsen